Anfinn Kallsberg:

# Tingmenn gera sum vant

**– Tað er vanligt, at tingið ikki rættiliga fer ígongd fyrr enn í september, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður, sum ikki heldur tað vera løgið, at nýggja løgtingið higartil hevur havt so lítið at gjørt**



*Anfinn Kallsberg heldur, at løgtingsvalið hevur ávirkað arbeiði hjá tingmonnum. Sostatt er innsatsurin hjá tingi og landsstýri ikki minni enn vanligt er*

LØGTINGIÐ
*Heri á Rógvi*

Samgonguovastin, Anfinn Kallsberg, missir ikki svøvnin av, at løgtingið ikki hevur verið so nógv saman síðani løgtingsvalið.

– Tað plagar ikki at vera tað stóra í august. Vanliga koma tey flestu lógaruppskotini í heyst. Tað er vanligt, at tingið ikki rættiliga fer ígongd fyrr enn í september, sigur Anfinn Kallsberg.

Løgmaður vísir á, at løgtingsval hevur verið, og hetta hevur merkt arbeiðsgongdina hjá tinginum.

– Tingið fór ógvuliga tíðliga til hús í mars. Vanliga plagar hetta at vera í mei mánað, soleiðis at steðgurin gjørdist drúgvur. Vanliga kemur tingið saman á ólavsøku og nakrar fáar dagar í august í sambandi við fiskidagarnar o.a. Eg hugsi ikki, at nøkur eyka fíggjarlóg er samtykt í august, sigur Anfinn Kallsberg.

Arbeiðið – ella væntandi arbeiðið – hjá tingmonnum hevur verið uppi og vent í fleiri av fjølmiðlunum. Spurnartekin eru sett við arbeiðsinnsatsin hjá tingmonnum og kvinnum, tí tingið ikki hevu verið nógv saman.

Í seinastu tingsetu var síðsti fundur áðrenn summarsteðgin hildin 4. mei. Seinasta løgtingsmanningin var fyri síðstu ferð saman hin 15. mars eftir at arbeitt var til langt út á kvøldarnar fyri at náða øll tey málini, ið vórðu løgd fyri tingið. Eftir valið, sum var hildið 30. apríl, hevur løgtingið verið saman fyrst tvær ferðir fyri at velja nevndir, løgtingsformann og góðkennan av valbrøvum.

Íroknað tingfundin á ólavsøku hava seks tingfundir verið á skránni síðani. Hin sjeyndi er í dag – týsdagin.

Til sammetingar kunnu vit nevna, at tingið í fjør hevði havt ellivu fundir, áðrenn komið var í september.

### Tekur tíð

Ì løgmansrøðu sínari á ólavsøku kunngjørdi løgmaður, hvørji lógaruppskot skulu væntast í heyst og í vetur. Skilt var ímillum tey, ið skulu koma fyri tingið í ár, og tey, ið koma fyri tingið næsta ár.

Anfinn Kallsberg sigur, at tað tekur tíð at fyrireika lógaruppskot. Roknast skal í øllum førum við einum 2-3 mánaðum.

Tað er heldur ikki lítið, ið landsstýrismenn og umsiting ætla at fáa frá hondini í ár.

Hyggja vit eftir teimum einkultu ráðunum, síggja vit, at oljumálaráðið ikki ætlar sær at koma við nøkrum í ár. Trivnaðarráðið hevur eftir øllum at døma úr at gera. Ikki færri enn níggju lógaruppskot skulu tingmenn vænta at síggja frá Bill og Páll.

Mentamálaráðið kemur við sjey uppskot um, har eitt er eitt tilmæli.

Fólkini hjá Bjarna Djurholm skulu stríðast fyri fimm uppskotum.

Fiskimálaráðið kemur við trimum uppskotum og løgmálaráðið ætlar sær niðan í tingið við tveimum uppskotum.

Løgmálaráðið kemur við sjey uppskotum og Fíggjarmálaráðið kemur við fimm uppskotum. Sostatt skulu 38 uppskotnum fyri tingið, áðrenn árið er runnið.

# Vinnudagurin og ársins virki

**Íslendski fiskimálaráðharrin verður ein av røðarunum**

**Tíðindaskriv**

Tann 4. oktober verður vinnudagurin, har ársins virki á triðja sinni skal kjósast. Eisini hesaferð eru kendir útlendingar á skránni sum røðarar.

Í 2000 tók Føroya Arbeiðsgevarafelag stig til ein afturvendandi vinnudag, har ársins virki verður kjósað. Í ár verður tiltakið 4. oktober, og tá skal ársins virki veljast á triðja sinni. Norðurlandahúsið er aftur karmur um tiltakið, og døgurðin aftaná verður á Hotel Føroyum.

Undanfarnu vinnudagarnir hava fingið sera góða undirtøku frá vinnulívsfólki. Í fjør luttóku gott 250 fólk í Norðurlandahúsinum, har áhugaverdir fyrilestrar vóru á skránni umframt sjálva kjósanina av ársins virki.



*Árni M. Mathiesen, íslendski fiskimálaráðharrin.*

Fyrstu ferð gjørdist Havsbrún í Fuglafirði Ársins virki, og í fjør var tað Tórshavnar Skipasmiðja sum fekk henda heiður. Og spenningur verður ivaleyst um, hvat triðja virki í røðini verður.

Higartil hevur dómsnevndin lagt á m.a. góð fíggjarlig úrslit og stabilan rakstur.

Tveir kendir útlendingar koma at halda fyrilestrar á vinnudegnum. Annar er Johan Schrøder, stjóri í stóru fyritøkuni Radiometer, og formaður í størsta danska vinnufelagnum Dansk Industri. Hann er kendur sum ein framsíggin leiðari og sum ein av teimum sum lurta verður eftir, tá hann kemur við sínum beinraknu viðmerkingum til gongdina innan vinnuna og samfelagsgongdina í Danmark.

Hin útlendski fyrilestrarhaldarin er eingin minni enn Íslendski fiskimálaráðharrin, Árni M. Mathiesen.

Átak hjá LFÚ:

# On-line bústaðir

**Fyri at betra um korini hjá teimum lesandi, ætlar LFÙ at royna alnetið sum bústaðarmið**

LESTRARLÍV
*Heri á Rógvi*

Tað er alt annað enn lætt í hesum døgum hjá ungum lesandi at fáa til vega bústað. Hetta hevur LFÚ (Landsfelag føroyinga í útbúgving) eisini sannað. Tí-skil er farið undir eitt nýtt átak, ið verður kallað fyri On-line bústaðir.

– Inni á heimasíðuni hjá LFÙ verður lýst við teimum bústøðum, ið eru til leigu. Heimasíðan verður dagførd regluliga. Tey, ið lýsa á heimasíðuni hjá LFÚ, hava vent sær til okkum við upplýsingum og myndum av tí, tey leiga út, og við einum ynski um at leiga út til fólk, sum eru undir útbúgving, skrivar LFÙ í tíðindaskrivi.

Regin W. Dalsgaard, Fíggjar og Samskifisleiðari hjá LFÙ, sigur, at tey hava vónir um at betra um korini hjá teimum lesandi. Tað er ein stórur partur av teimum lesandi í Føroyum. Tey hava – serliga undanfarin ár – merkt, at tørvur er á bústaðum fyri tey lesandi.

Skipanin hjá LFú er longu farin at virka á heimasíðu teirra www.lfu.fo.

Regin W. Dalsgaard vónar, at hetta fer at gera tað léttari hjá teimum lesandi at fáa bústað. Tað er serliga í Havnini, at trupulleiki er stórur við bústøðum.

LFÚ hevur eisini ætlanir um at gera fleiri átøk seinni í ár og næsta ár. Felagið fekk fyri stutt síðani eina nýggju nevnd, ið hevur sett sær fyri at gera LFÙ meira sjónligt.

### Stórur áhugi

Claus Reistrup er Undirvísingarleiðari, Studentaskúlar og HF-skeið á mentamálaráðnum. Afturat tí er hann eisini leiðari fyri skúlaheimið í Berjabrekku, sum er eitt av skúlaheimunum í Havn.

– Vit hava merkt stóran áhuga í Berjabrekku. Vit fáa dupult so nógvar umsóknir sum tað eru pláss, sigur Claus Reistrup.

Skúlaheimið í Berjabrekku er einans fyri skúlanæmingar í Studentaskúlanum og HF-skeiðinum. Í Berjabrekku er kostnaðurin 1.500 kr. um mánaðin fyri eitt kamar. Ein sjálvsognarstovnur eigur skúlaheimið í Berjabrekku.

Í Havn eru eisini onnur skúlaheim, ið hýsa næmingum.

Claus Reistrup greiðir frá, at tað er munur á Føroyum og í Danmark í hesum føri.

– Í Danmark verða kollegiir gjørd fyri lesandi, men í Føroyum er tað fyri tað allarmesta skúlaungdómar, ið búgva í skúlaheimum, sigur hann.



# »Spæl« sum ikki er at spæla við

**Millum børn hevur eitt spæl tikið seg upp, har endamálið er at fáa hvørt annað at svíma. – Hetta er alt annað enn vandaleyst og kann millum annað elva til hjartasteðg, sigur Steingrímur Weihe, lækni, sum Sosialurin hevur tosað við**



*Spælið gongur fyri seg í bólki, har eitt av børnunum stillar seg upp móti einum veggi. Ikki øll børn tora at leggja kropp til hetta ódámliga spæl, og onkur er komin til hús, grátandi av ræðslu, siga foreldur. – Jú, so avgjørt er hatta spælið vandamikið. Tað kann í ringasta føri elva til hjartasteðg, sigur Steingrímur Weihe, kommunulækni við Sosialin*

*Modelmynd: Rúna Sivertsen*

VANDAMIKIÐ SPÆL
*Rúna Sivertsen*

Spælið gongur fyri seg í bólki, har eitt av børnunum stillar seg upp móti einum veggi.

Tá barnið hevur hyperventilerað eina løtu, heldur tað ondini, og eitt av hinum børnunum rennir tá høvdið ella nevan inn í flagbróstið á barninum, so tað fellur í óvit.

Hini børnini standa tá til reiðar at lofta, so svímaða barnið ikki dettur og slær seg í.

Vit hava fregnast millum børnini og skilja, at hetta spælið als ikki er óvanligt og verður spælt millum børn í fleiri bygdum í Føroyum.

Tey, sum minst kenna til spælið, eru tey vaksnu, sum næstan øll siga, at tey ikki hava hoyrt grett um eitt slíkt spæl áður.

Ikki øll børn tora at leggja kropp til hetta ódámliga spæl, og onkur er komin til hús, grátandi av ræðslu, siga foreldur fyri Sosialinum.

### Vandamikið spæl

Vit vendu okkum til læknavaktina í Norðoyggjum. Í telefonini hittu vit Steingrím Weihe, sum í mong ár hevur starvast sum kommunulækni.

Spurdur, um hetta spæl kann verða vandamikið fyri børnini, sigur Steingrím:

– Jú, so avgjørt er hatta spælið vandamikið. Tað kann í ringasta føri elva til hjartasteðg.

– Eisini er vandi fyri, at miltið ella livurin rivna. Um miltið rivnar, verður ein ógvuslig bløðing, sum krevur innlegging í stundini, og miltið má takast, sigur hann.

Læknin leggur dent á, at hetta spælið kann verða lívshættisligt.

### Børnini mugu kunnast

Við onkran skúla hava foreldur sett seg í samband við heilsusystrina at siga frá, hvat børnini havast at.

Vit vendu okkum tí til Bjartu Vilhelm, leiðara fyri heilsusystraskipanina og spurdu hana, hvat heilsusystrarnar kunnu gera.

– Frá børnum havi eg hoyrt um spælið, men havi enn onga áheitan fingið, hvørki frá foreldrum ella heilsusystrum, sigur Bjarta.

– Men børnini mugu fáa at vita, at hatta ikki er nakað spæl. Tað er neyðugt at greiða teimum frá, hvat tað er, sum hendir og hvat í ringasta føri kann henda, sigur Bjarta Vilhelm at enda.

Tey, sum Sosialurin hevur tosað við, eru øll samd um, at hetta er álvarsligt og at neyðugt er at ávara børn ímóti at vera við í hesum hættisliga leiki.

# Lítið meldað til tryggingina

**Sjálvt um vindurin hevur verið rættiliga nógvur um vikuskiftið, so merkist hetta ikki aftur hjá tryggingarfeløgunum**



*Hóast nógva vindin um vikuskiftið, so hevur Tryggingarfelagið Føroyar ikki havt meira at gjørt enn vanligt*

*Savnsmynd*

TRYGGINGAR
*Ingrid Bjarnastein*

Veðrið hevur rættiliga gjørt um seg um vikuskiftið. Bæði samferðsla og ítróttur hava verið darvað av nógva vindinum. Fleiri fótbóltsdystir vórðu avlýstir, meðan flestu av strandfaraskipunum avlýstu túrar sínar vegna veður.

Á Tryggingarfelagnum Føroyar hava tey tó ikki merkt nakað serligt til vindin og óveðrið. Sjálvt um vindurin hevur verið nógvur, so er millum lítið og onki meldað til tryggingina. Ella soleiðis var í øllum førum fyrrapartin mánadagin.

Á biladeildini høvdu tey bara fingið fráboðan um ein bil, sum var farin útav.

– Skaðar plaga at verða meldaðir næstan beinanvegin aftaná teir eru hendir, verður sagt av Tryggingini.

– Um skaðin hevur verið um vikuskiftið, so plaga fólk at boða frá mánadag ella týsdag. Men tað kunnu væl ganga eini tveir – tríggir dagar áðrenn skaðin verður fráboðaður.

Ongin freist er fyri, hvussu leingi ein kann bíða við at boða frá einum skaða. Ein kann væl bíða upp til ein mánaða, men tó eru nakrir reglar ein skal taka fyrilit fyri.

– Tað ber ikki til at bíða við størri ringum skaða, sum síðani gerst verri. Ein tílíkur skaði skal fráboðast beinanvegin.

Men sum sagt, so varð lítið og onki fráboðað av skaðum um vikuskiftið, so Tryggingarfelagið Føroyar hevur ikki havt meira at gjørt enn vanligt.

## Fullir eftir havhesti

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Klokkan gott tvey seinnapartin leygardagin, kom Brimil sleipandi inn á Runavíkina við einum lítlum útróðrarbáti. Báturin hevði fingið motorsteðg, og tá hann kom á havn, varð funnið útav, at teir báðir menninir, sum vórðu við bátinum vóru báðir fullir.

Menninir við bátinum høvdu verið eftir havhesti. Blóðroynd varð tikin av teimum, og bót verður givin teimum fyri brot á sjólógina, upplýsir politistøðin í Runavík.